# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Karolina Petersen

11. oktober 2006 andaðist Karolina Petersen; Fugloyarvegur, Tórshavn, 82 ára gomul, eitt virkið æviskeið er endað.

Í 1954 heitti Vanlukkutryggingarráðið á Karolinu Petersen um at kanna hvussu endurbúgvingin var í Danmark, og um hvussu tílík kundi verða skipað í Føroyum. Longu á heysti 1955 høvdu Karolina og Petur frálæru í prestagarðinum í Hvalvík við trimum næmingum, fyrrapart undirvístu prestahjúnini og seinrapart lærarar í fólkaskúlanum.



Endurbúgvingin varð síðan skipað undir heitinum ALV, stovnað 16. apríl 1956, og Vanlukkutryggingarráðið setti stýrið við Karolinu sum rakstrarleiðara. Hon sat sum rakstrarleiðari, til stovnurin í 1999/2000 var umskipaður.

Tey nógvu árini stóð Karolina rættuliga einsamøll við dagligu ábyrgdini av ALV, og ikki var tað bara sum at siga tað at seta slíka útbúgving í verk. Karolina hevði visiónir um eina endurbútbúgving, sum skuldi røkka mesta tørvin at fáa tey, sum eru arbeiðsskerd og førleikatarnað aftur í vinnu; at fáa tað besta burturúr við møguleikum, sum tá vóru í einum samfelag, avbyrgt - ikki minst samferðsluliga. Karolina fekk í lag samskifti við vinnufyritøkur, arbeiðspláss, almennar stovnar og fólk, ið vildu taka tey í arbeiði, sum vórðu umskúlað við Áir.

Mong eru Karolinu og Peturi takksom fyri umskúlingina og umsorganina tey fingu við Áir - treysti av nýggjum í gerandislívinum.

Karolina Petersen var eisini íbirtarin á øðrum økjum - fekk í lag sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn, vistarheimið á Fugloyarvegi í Havn og vistarheimið í Torfinsgøtu 41 í Havn.

Stóra takið var at arbeiði av føroysku frímerkjaútgávuni er markað teimum, sum arbeiðsliga eru skerd. Uttan hennara ágrýtni var málið ikki rokkið. Karolina var eldsálin, sum ongantíð gavst í strembanini, at bøta um kor teirra likamliga skerdu.

Sjálv visti hon av sjúku frá ungu árunum.

Frið lýsa vit yvir minnið um megnarkvinnuna Karolinu Petersen.

**Jákup Lindenskov**



*Í 1964 var danski sosialmálaráðharrin Julius Bomholt á vitjan í Føroyum. Her heilsar Bomholt upp á Karolinu Petersen við Áir, undir liðini stendur Niels Elkjær Hansen ríkisumboðsmaður. Fremst, Petur Petersen, hvalvíksprestur. Niels Winther Poulsen landstýrimaður stígur í land av »Thorshavn«. Í stýrihúsglugganum skiparin Johan Sivertsen. Ungu fólkini á myndini eru skeiðluttakarar við Áir*

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sigga á Stongunum í Klaksvík** andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi sunnudagin, 83 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

---

**75 ára føðingardagur**

Mánadagin 6. nov. verður Hallgerð Andreasen Leirvík 75 ár, dagurin verður hildin leygardagin 4. nov. frá kl 13.00 til 16.00 í missiónshús kjallaranum í Leirvík.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaði sonur og beiggi

**lítli Høgni Bogason á Borg**

andaðist sunnudagin 29. oktober 2006, fýra mánaðir gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 2. november 2006 kl 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Marian, Bogi, Guðrið og Heidi**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Bertel Uhre Johnsen**
Leirvík

andaðist og varð jarðaður
Tøkk til Una Næs, prest, og Jógvan Páll Sevdal fyri troystarík orð í kirkjuni og í kapellinum. Tøkk til Essa fyri góða hjálp og vakran sang í kirkjuni.
Eisini tøkk til Juliu og Randal fyri ta hjálp tit veittu okkum, meðan Bertel var sjúkur og nú hann slóknaði.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar, gravarar og tykkum øllum, sum hjálptu okkum so væl við ervinum.
Tøkk fyri kransar og pengagávur til kirkjuna.
Tøkk tit øll, ið fylgdu Bertel til hansara seinasta hvíldarstað.

**Selma, Suffía Malena, Kjartan, Bartal og Katrina**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum sýndu samkenslu, tá góði pápi, verfaðir, abbi, langabbi og bróðir okkara

**Poul Andreas Hansen**
Skála

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Niels Jacob Nielsen og Jógvan Fríðriksson fyri góð og troystarrík orð, og Evald Sørensen fyri vakran sang.
Takk til kirkjutænarar og sangarar. Takk fyri blómur og kransar og fyri peningagávu til Meinigheitshúsið. Takk til øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til heimahjálpirnar og starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum, ið tóku sær so væl av honum.

*Vegna tey avvarðandi*
**Elias, Andrass og Magnus**

---

## Tøkk

Øllum tykkum sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá elskaða kona og mamma okkara

**Guðrun Hervør Joensen**

andaðist og varð jarðað, ynskja vit at takka hjartaliga.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til synirnar.
Hjartans tøkk til Ingu Poulsen Dam, prest. Og takk til tykkum mongu, ið fylgdu Guðrun til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Oddmar, Borgar og Eigil**